BUM!
Avbjóðing!

(NB! Um tit ikki eiga post-it lepar muga tit gjarna brúka vanligt pappír)

Gerið eina post-it framsýning!

Tit skulu brúka post-it lepar – gjarna í ymiskum litum!

**Her eru tvær uppgávur:**

| **Post-it**<br>**Hvønn týdning hevur myndlist?** | **Post-it**<br>**Teknimaraton!** |
|---|---|
| **ListaMeldur** heldur, at myndlist er ein sera týdningarmikil lærugrein í skúlanum!<br><br><br>Men júst hví hevur myndlist so stóran týdning?<br><br>Gerið eitt hugarok! Lærarin festir ein post-it lepa á veggin við orðunum "Myndlist er umráðandi tí…."<br><br>Síðani fáa tit øll ein ella fleiri post-it lepar, har tit skriva tykkara meining á. Tit kunnu t.d. taka uppgávuna við heim og tosa við foreldrini um evnið. Um tað er onkur, sum vil skriva fleiri lepar, er tað eisini í lagi 😊<br><br>Gerið tykkum ómak, tá tit skriva svarini á lepan. Tit mugu gjarna pynta lepan, skriva í ymiskum litum o.s.fr., so tit fáa eina flotta post-it framsýning!<br><br>Sendið myndir til henny@nam.fo og/ella leggið út á instagram og tagga **ListaMeldur** við at skriva *#ListaMeldur* | Finnið ein vegg í skúlanum, sum tit kunnu brúka til at hanga leparnar á.<br><br>Allir næmingarnir fáa ein post-it lepa at tekna á.<br><br>**Uppgávan ljóðar soleiðis:**<br>Teknið eina tekning við einans grundlitum!<br>Teknið eina tekning við einans undirlitum!<br><br><br><br>**Grundlitirnir** eru í miðuni: blátt, reytt og gult<br>**Undirlitirnir** eru teir litirnir, vit fáa um vit blanda tveir og tveir grundlitir: grønt, appilsingult og violett.<br><br>Lærarin avger, um tit tekna júst tað, tit hava hug til, ella um tit velja eitt evnið 😊<br><br>Sendið myndir til henny@nam.fo og/ella leggið út á instagram og tagga **ListaMeldur** við at skriva *#ListaMeldur* |